# Samfelagsmenning - vald og demokrati

**Granskingar- og menningarætlan 2010-2015**

**Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning**

# Innihaldsyvirlit

Fororð....3
1. Inngangur....4
2. Granskingarætlan árini 2010 - 2015....5
2.1. Tilfeingisumsiting....5
2.2. Vald í samfelagnum....6
2.3. Samfelagsmenning í smátjóðum....6
2.4. Policy studies og aðrar kanningar....6
2.5. Granskingarkjarnar, granskingarleiðarar og granskarar....7
3. Menningarætlan....8
3.1. Førleikamenning....8
3.2. Krøv til útgávur og miðlan....8
4. Samstarv við Søgu- og Samfelagsdeildina....10
4.1. Samstarv um granskingarverkætlanir....10
4.2. Samstarv um undirvísing....10
4.3. Samstarv við aðrar deildir á Setrinum....10
5. Fortreytir fyri Granskingar- og Menningarætlanini....11
5.1. Fakligar fortreytir....11
5.2. Fíggjarligar fortreytir....11
5.3. Karmar....11
Yvirlit yvir útgávur 2000 - Jan. 2010....13

## Fororð

Granskingar og menningarætlanin er eitt arbeiðsskjal, sum hevur verið gjøgnumarbeitt yvir eitt longri tíðarskeið og hava øll starvsfólk á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning verið partur av arbeiðinum.

Granskingar- og menningarætlanin er grundað á 10 ára royndir hjá fyrrverandi Granskingarverkætlanini fyri Økismenning, nú Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning. Harumframt er eftirmetingin av Granskingarverkætlanini fyri Økismenning (Amdam og Kleven, 2002: Evaluering af "Forskningsprojektet for regionaludvikling i Klaksvik, Volda (NO): Møreforskning) eisini havt týðandi ávirkan á granskingar- og menningarætlanina.

Vágur, 1. februar 2010

Dennis Holm, leiðari

# 1. Inngangur

Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning er ein granskingardepil, sum hevur til endamáls at fremja og menna samfelagsvísindaliga gransking. Granskingarvirksemi fevnir bæði um føroyskar og altjóða granskingarverkætlanir.

Virksemið er fíggjað við játtan á løgtingsfíggjarlógini og við inntøkum frá verkætlanum fyri landsmyndugleikar, kommunur, arbeiðsgevarafeløg, fakfeløg, stovnar og áhugafeløg, umframt við luttøku í størri og minni altjóða granskingarverkætlanum.

Umframt kjarnuvirksemi, sum er gransking, so hevur Granskingardepilin frá byrjan (2000) latið skeið, sum hava verið partur av undirvísingini á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Partarnir hava gjørt avtalu um undirvísingina og gjald fyri hetta.

## 2. Granskingarætlan árini 2010 - 2015

Undir høvuðsheitinum *Samfelagsmenning – vald og demokrati* er gjørd granskingar- og menningarætlan fyri komandi árini. Gransking innan evni samfelagsmenning, vald og demokrati fevnir um gransking av teimum mest grundleggjandi viðurskiftunum í samband við, hvussu eitt samfelagið er skipað og samansett, og hvussu virðini í samfelagnum verða býtt.

Evnið *Samfelagsmenning - vald og demokrati* fevnir víða, men eru í granskingar- og menningarætlanini vald út nøkur undirevnið, ið vit hava valt at leggja dent á komandi árini á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning.

Valdsanalysur av ymiskum slagi eru í grannalondum okkara oftani týðandi partur av grundarlagnum, tá viðurskifti í samfelagnum verða tikin upp til t.d. politiska viðgerð, mett ella eftirmett, og dagførd ella skipaði av nýggjum. Í Føroyum eru ikki traditiónir fyri slíkar gransking, hóast slík gransking hevur eins stóran týdning í føroyska samfelagnum, sum í grannalondum okkara.

Nú Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning setir evnið *Vald og demokrati* á dagskrá verður hetta ætlandi broytt og fara ymisk sløg av valdsanalysum at gerast partur av føroysku samfelagsgranskingini í framtíðini.

Gransking innan vald og demokrati fevnir sum nevnt víða og fer Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning í árunum 2010 – 2015 at leggja dent á fýra kjarnugranskingarevnir. Hesi eru:

- Tilfeingisumsiting
- Vald í samfelagnum
- Samfelagsmenning í smátjóðum
- Policy studies og aðrar kanningar

Hesi evnini eru viðkomandi fyri føroyska samfelagið, tí tey á ein hvønn hátt øll hava ávirkan á okkara gerandisdag og eru tí eisini viðkomandi í granskingarhøpi (meiri um hetta niðanfyri).

### 2.1. Tilfeingisumsiting

Føroyska samfelagið er eitt ekstremt dømi um eitt samfelag, sum er tengt at náttúru tilfeinginum, í okkara føri at fiskivinnuni. Okkara háttur at umsita hetta tilfeingið, Fiskidagaskipanin, er ikki eins skipaður og í øðrum londum. Tískil er eisini tørvur á gransking, sum kann virkað við til at lýsa fleiri viðurskifti, sum hava við fiskivinnuumsitingina at gera, bæði í føroyskum og í altjóða høpi. Hetta er bæði galdandi fyri lýsingar av teimum samfelagsligu árinunum, føroyska tilfeingisumsitingin hevur, og í samband við at vit, út frá egnum eins væl og altjóða royndum, menna okkara tilfeingisumsiting. Somuleiðis er gransking av føroysku fiskivinnuumsitingini eisini áhugaverd í øðrum høpi, t.d. tá samanberast skal millum ymiskar hættir at umsita fiskiveiðu.

Evnið tilfeingisumsiting fevnir tó um meiri enn umsiting av tilfeinginum í sjónum (fiskivinnuna). Tilfeingisumsiting fevnir eisini um umsiting av einum møguligum komandi tilfeingi innan kolvetni, sum jú kann broyta føroyska samfelagið heilt grundleggjandi. Árinini av einari føroyskari oljuvinnu fara at merkjast út í hvønn krók í samfelagnum og eru samfelagsligar árinskanningar av einari møguligari oljuvinnu tí neyðugar.

Tilfeingisumsiting fevnir eisini í stóran mun um umsiting av tí humana tilfeinginum. Ein stór avbjóðing í Føroyum í dag er, eins og í øðrum fiskivinnusamfeløgum í útjaðaranum í Norðurlondum, at draga til sín útbúgving fólk. Hetta er bæði galdandi tá umrøður at fáa tey nógvu ungu, sum fara av landinum at nema sær útbúgving, at venda heimaftur eftir lokna útbúgving, og

galdandi fyri onnur fólk við útbúgving, sum kunnu gerast eitt tilfeingi fyri føroyska samfelagið. Granskingardepilin hevur farnu árini granskað í hesum evninum, sum eisini í komandi árum verður partur av granskingini á Granskingardeplinum.

*Undirevnir:*
Fiskivinnu-/fiskiveiðuumsiting, fiskivinnan og atknýttar vinnur; olja og atknýttar vinnur; fiskitilfeingi, oljutilfeingi, humantilfeingi.

## 2.2. Vald í samfelagnum

Gransking innan evni vald í samfelagnum fevnir, sum nevnt, um gransking av teimum mest grundleggjandi viðurskiftunum í samband við, hvussu samfelagið er skipað og samansett, og hvussu virðini í samfelagnum verða býtt.

Í grannalondum okkara eru valdsanalysur av ymiskum slagi vanligur partur av granskingini á granskingardeplum og –stovnum. Í Føroyum eru ikki traditiónir fyri slíkar gransking og er ongin verulig valdsanalysa gjørd í Føroyum, ein og tær stóru valdsanalysurnar, ið vit kenna frá t.d. Norra, Svøríki og Danmark.

Granskingardeplin fer komandi árini at seta fokus á hetta evnið. Fleiri verkætlanir innan evnið eru longu farnar í gongd á Deplinum, og verður eisini farið undir aðrar verkætlanir hesi komandi árini.

*Undirevnir:*
Vald og stættir í samfelagnum, vald og vælferðarsamfelagið, vald og álits- og nevndarsessir, vald og kyn, vald og mál, vald og miðstaðarøkið mótvegis útjaðaran, vald og viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.

## 2.3. Samfelagsmenning í smátjóðum

Samfelagsmenning í smátjóðum hevur síðan føroysk samfelagsgransking byrjaði á Fróðskaparsetri Føroya verið fastur partur av granskingarevnunum innan føroyska samfelagsgransking. Evnið økismenning hevur eisini verið týðandi partur av virkseminum á Granskingardeplinum og er tað framvegis.

Fyri ein stovn sum Granskingardepilin er gransking innan samfelagsmenning í smátjóðum ein natúrligur partur av virkseminum. Føroyska samfelagið hevur nógvar avbjóðingar tá umræður at skapa menning, og við miðvísari gransking innan evnið samfelagsmenning verður skapt eitt sterkari grundarlag, t.v.s. vitan og førleiki, tá slíkir avbjóðingar skulu viðgerast, bæði í landspolitiskum og komunalpolitiskum høpi.

*Undirevnir:*
Økismenning, vakstraravtalur, útjaðaramenning, kommunalar eindir og menning, smátjóðir og menning

## 2.4. Policy studies og aðrar kanningar

Í grannalondum okkara og í vesturheiminum sum heild er tað vorðið vanligt at gera sonevnd “policy studies”, sum millum annað fevna um undan- og eftirmetingar av politiskum átøkum, kanningar av hugburði til ávís átøk, kanningar av støðunum hjá ávísum samfelagsbólkum o.s.fr. Hetta eru eisini kanningar, sum eru ein vanligur partur av arbeiðinum á Granskingardeplinum – og verður tað eisini í komandi árum.

Hesar granskingarverkætlanir hava í nógvum førum verið umbidnar kanningar, antin av almennum stovnum, kommunum ella áhugabólkum í samfelagnum.

## 2.5. Granskingarkjarnar, granskingarleiðarar og granskarar

Í 2001 og 2002 stóðu Jørgen Amdam, professari, og Terje Kleven, senior-granskari, báðir úr Norra, fyri eini eftirmeting av Granskingarverkætlanini fyri Økismenning (Amdam og Kleven, 2002). Mentamálaráðið hevði biðið um eftirmetingina, og varð hon fyriskipað í samstarvi við føroyska Granskingarráðið og norska Forskningsrådet.

Umframt at eftirmetingin staðfestir, at Granskingarverkætlanin eigur at stovnsetast sum ein granskingardepil, so verða í eftirmetingini eisini viðgjørd fleiri viðurskifti, sum hava við menninginina av Granskingardeplinum at gera. Í eftirmetingini av Deplinum verður lagt upp til, at granskað verður í 3-4 valdum granskingarøkjum í eitt ásett tíðarskeið. Víst verður á, at talið av granskarum á Granskingardeplinum eigur at verður økt til í minsta lagi 10, har 2-3 granskarar verða knýttir at hvørjum granskingarøkið.

Hesin leistinum hava vit arbeitt eftir tey seinastu árini og koma í framtíðini eisini framhaldandi at arbeiða eftir honum.

Tey fýra granskingarevnini, sum dentur verður lagdur á í hesari Granskingar- og menningarætlanini, hava við sær, at 2-3 granskarar verða knýttir at hvørjum granskingarevni. Granskingarevnini eru somikið umfatandi, at tey krevja fleiri ymiskar førleikar. Tí verður mett, at 2-3 granskarar skulu knýtast at hvørjum granskingarøkinum.

Við øðrum orðum verður í Granskingar- og menningarætlanini lagt upp til, at ein granskingarleiðari kemur at taka sær av tí einstaka granskingarkjarnanum, og so hvørt fíggjarligu umstøðurnar hjá Granskingardeplinum loyva tí, verða granskarar knýttir afturat teimum ymisku kjarnunum. Sí eisini kap. 5.2 Fíggjarliga fortreytir fyri granskingar og menningarætlanini.



Fýra kjarnu-granskingarevnir, har granskingar-leiðarar við altjóða førleika eru granskingar-leiðarar og aðrir granskarar eisini eru partur av granskingarverkætlanum.

Granskingardepilin hevur í dag uppbygt førleikar, sum gera, at vit eru ein natúrligur partur í altjóða granskingarverkætlanum – og hevur luttøka í altjóða granskingarverkætlanum eisini verið ein natúrligur partur av virksemi okkara seinastu árini.

## 3. Menningarætlan

Endamál við Granskingar- og Menningarætlanini er at skunda undir og virka við til, at Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning uppbyggir ein serførleika og eina servitan innan ávís granskingarøkið – og at føroysk samfelagsgransking á tann hátt eisini verður ment.

Í eftirmetingini hjá Amdam og Kleven (2002) verður stórur dentur lagdur á, at granskarar á Granskingardeplinum vinna sær altjóða viðurkendan førleika og soleiðis eisini hava førleika til at hava ábyrgdina av teimum ávísu kjarnu-granskingarevnunum, sum verða sett á dagsskrá í granskingarætlanini. Umframt granskingarleiðara fyri tey einstøku kjarnugranskingarevnini, sum nevnd eru í undanfarnum parti, so er tað eisini neyðugt at aðrir granskarar verða knýttir at hesum granskingarevnum, knýttir at teimum ymisku granskingarverkætlanunum.

Við útgangsstøðið í kjarnu-granskingarevnunum og granskingarverkætlanum á Granskingar-deplinum, verður grundarlag skapt soleiðis at granskarnir á Deplinum kunnu mennast, umframt at krøv verða sett til granskararnir um útgávur (output) av ymiskum slagi.

### 3.1. Førleikamenning

Ein av kjarnuuppgávunum hjá Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning er at virka við til, at starvsfólk á deplinum fáa møguleika at menna egnan granskingarførleika og at nema sær Phd-útbúgving, hetta føroyskari samfelagsgransking og føroyskum granskingarførleika at frama.

Tað er ein málsetningur, at tað í tíðarskeiðinum frá 2010 til 2015 verða útbúnir í minsta lagi tveir Phd-arar innan granskingarøkini, sum eru partur av Granskingar- og Menningarætlanini á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning.

Tað er ein málsetningurin, at tað fyri hvørt kjarnu-granskingarøkið verður ein Phd-ari, sum hevur fakligan serkunnleika.

Tað er eisini ein málsetningur, at granskarar á Granskingardeplinum innan eitt 5 ára skeið hava nomið sær Phd-útbúgving ella sambæriligan førleika.

### 3.2. Krøv til útgávur og miðlan

Ein týðandi partur av virkseminum hjá einhvørjum granskingarstovni er at breiða út vitanina í samband við granskingarúrslitini. Hetta er eisini ein týðandi partur av virkseminum hjá Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning.

Miðað verður ímóti, at tann einstaki granskarin á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning (sjálvur ella í samstarvi við onnur) í tíðarskeiðinum 2010 til 2015 árliga gevur út 2 arbeiðsrit (ella aðrar útgávur lík hesum). Miðað verður eisini ímóti at Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning gevur út 2 bøkur í nevnda tíðarskeiði. Í tíðarskeiðinum 2010 – 2015 er málsetningurin eisini, at tann einstaki granskarin (sjálvur ella í samstarvi við onnur) gevur út 3 útgávur í altjóða vísindaligum tíðarritum.

Umframt útgávur, skulu granskarar á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning eisini við jøvnum millumbiðlum luttaka og leggja fram granskingarúrslit á altjóða ráðstevnum.

Tað hevur frá byrjan verið ein málrættað strategi hjá Granskingardeplinum at miðla tey granskingarúrslit, sum verða nátt, soleiðis at almenningurin fær størst gjørligan gagn av virkseminum á Granskingardeplinum. Umframt prentaðar útgávur, er luttøka í samfelagskjakinum í

fjølmiðlunum, á fundum og fyrilestrum eisini ein týdningarmikil partur av virkseminum hjá Granskingardeplinum.

## 4. Samstarv við Søgu- og Samfelagsdeildina

Granskingardepilin og Søgu- og Samfelagsdeildin hava seinastu 10 árini samstarva á nógvum ymiskum økjum. Granskingardepilin hevur í fleiri umførum móti gjaldi latið skeið, sum hava verið partur av undirvísingini í náminum í stjórnmálafrøði. Talan hevur verið um skeiðini Globalisering (15 ECTS) og Økismenning (15 ECTS).

Umframt samstarv um undirvísing, so hava granskarar á Søgu- og Samfelagsdeildini seinastu árini eisini verið partur av granskingarverkætlanum á Granskingardeplinum.

Á felagsfundi í desember 2009 millum starvsfólkini á Granskingardeplinum og Søgu- og Samfelagsdeildini varð framtíðar samstarvið umrøtt. Á fundinum var semja um, at samstarvið skuldi fevna um gransking og undirvísing.

### 4.1. Samstarv um granskingarverkætlanir

Granskingardepilin fer komandi árini – sum víst í kap. 2. – at leggja dent á granskingarverkætlanir innan trý høvuðsevni (umframt policy studies og aðrar umbidnar kanningar). Hetta eru eisini evnir, sum granskarar á Granskingardeplinum og granskarar á Søgu- og Samfelagsdeildini kunnu samstarva um.

Granskingardepilin og Søgu- og Samfelagsdeildin skulu hvørt hálvár hava felags seminar, har kunnað og kjakast verður um granskingarverkætlanir. Hesi seminar skulu skapa grundarlag fyri granskarsamstarvi og felags granskingarverkætlanum.

### 4.2. Samstarv um undirvísing

Semja er um at samstarva um undirvísing, har Granskingardepilin móti gjaldi letur skeið, sum eru partur av undirvísingin í samband við útbúgvingar á Søgu- og Samfelagsdeildini – hildið verður fram eftir sama leisti, sum higartil.

Samskipanin av undirvísingin verður gjørd í samband fyrireikingar av útbúgvingunum á Søgu- og Samfelagsdeildini. Granskarar á Granskingardeplinum kunnu bjóða skeið innan tey evni, sum granskað verður í á Deplinum, umframt onnur skeið, sum granskararnir hava serligan kunnleika í.

### 4.3. Samstarv við aðrar deildir á Setrinum

Umframt samstarv við Søgu- og Samfelagsdeildina, eigur Granskingardepilin eisini – í tann mun tað er nátúrligt – at samstarva við aðrar deildir á Setrinum. Talan kann til dømis verða um samstarv við Náttúrvísindadeildina um eitt nú fiskivinnuverkætlanir, ella við Læraraskúlan um t.d. verkætlanir innan vald og mál.

## 5. Fortreytir fyri Granskingar- og Menningarætlanini

Tað eru fleiri fortreytir sum eru neyðugar fyri at ein granskingar- og menningarætlan sum hendan skal kunna gjøgnumførast. Skiljast kann í hesum samband millum tann fakliga partin, tann fíggjarliga partin og so karmarnir kring Granskingardepilin.

### 5.1. Fakligar fortreytir

Tær fakligu fortreytirnar fyri at granskingar- og menningarætlanin kann gjøgnumførast fevna fyrst og fremst um fakligu førleikarnir hjá granskarunum, ið eru á Granskingardeplinum, men harumframt eisini um krøvini til fakligan førleika, hjá nýggjum granskarum á Granskingardepilin.

Sum er, hava allir granskarar á Granskingardeplinum drúgvar royndir og hava arbeitt sum granskarar í nógv ár. Granskararnir hava royndir innan ymisk øki av samfelagsfrøðini og er hetta eisini mett sum ein styrki fyri stovnin. Hetta virkar eisini við til, at tær fakligu fortreytirnar eru til staðar fyri at seta ígongd og gjøgnumføra granskingar og menningarætlanina, umframt at fortreytirnar eru til staðar fyri at kunna luttaka í altjóða granskingarverkætlanum.

### 5.2. Fíggjarligar fortreytir

Fíggjarligu fortreytirnar fyri at menna Granskingardepilin og føroyska samfelagsgransking hava verið avbjóðandi seinastu árini. Í veruleikanum hevur játtanin hjá Granskingardeplinum á Fíggjarlógini ikki rokkið longur enn til umleið 2 størv. Í løtuni eru 4 granskarar í fulla tíð og 2 eru knýtt at ymiskum verkætlanum á Deplinum. Fíggingin av virkseminum á Granskingardeplinum er partvís á Fíggjarlógini og partvís av øðrum granskingarverkætlanum. Uttanhýsisfíggjaðar granskingarverkætlanir hava sostatt ført við sær, at Granskingardepilin kann hava størri virksemi enn fíggingin á Fíggjarlógini loyvir. Høvuðsorsøkin er, at føroysk samfelagsgransking í vaksandi mun hevur útlendskan áhugað og tískil hava granskarar á Granskingardeplinum verið og eru framvegis eisini partur av fleiri størri og minni altjóða granskingarverkætlanum, sum eru fíggjaðar av útlendskum granskingargrunnum. Harumframt hevur Granskingardepilin eisini staðið fyri fleiri størri umbidnum føroyskum granskingarverkætlanum.

Í eftirmetingini hjá Amdam og Kleven (2002) verður mælt til, at játtanin til Granskingardepilin verður 2,5 mio. kr. Vit meta eisini, at tað er greitt er ein av fortreytunum fyri at gjøgnumføra granskingar- og menningarætlanina at játtanin til Granskingardepilin hækkar í komandi árum, soleiðis at játtanin í 2014 verður 2,4 mio. kr.

Vit mæla til at játtanin til Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning hækkar soleiðis:

| | |
|---|---|
| Játtan í 2009: | 1.262.000 kr. |
| Uppskot til játtan í 2010: | 1.312.000 kr. |
| Uppskot til játtan í 2011: | 1.500.000 kr. |
| Uppskot til játtan í 2012: | 1.800.000 kr. |
| Uppskot til játtan í 2013: | 2.100.000 kr. |
| Uppskot til játtan í 2014: | 2.400.000 kr. |

Talan er um eina hækking í játtanini uppá 16-24 prosent um árið og meta vit at hetta er ein realistisk hækking komandi árini.

### 5.3. Karmar

Karmarnir kring Granskingardepilin hava frá fyrstan tíð verið góðir, hetta er bæði galdandi fyri teir fysisku karmarnir og fyri møguleikarnir hjá granskarum at verða partur av størri granskingarumhvørvum. Hesi viðurskifti eru týðandi partar av karmunum, tá ræður um

møguleikarnir fyri at menna ein granskingarstovn og granskarar á einum stovni sum Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning.

## Yvirlit yvir útgávur 2000 - Jan. 2010

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir útgávurnar sum granskarar á Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning hava verið partur av fram til januar 2010.

**Bókaútgávur**

| | |
|---|---|
| 2008 | **Nøgdir og nýbrot – føroysk fiskivinnumenning í fimmti ár.**<br>Dennis Holm og Bogi Mortensen. Tórshavn: Sprotin 2008. |
| 2002 | **The Restructuring of the Faroese Economy – The significance of the Inner Periphery.**<br>Richard Apostle, Dennis Holm, Gestur Hovgaard, Ólavur Waag Høgnesen, Bjarni Mortensen. Keypmannahavn: Samfundslittertur 2002. |

**Arbeiðsrit**

| | |
|---|---|
| Arbeiðsrit 24, 2009: | **Hvar endaðu tey øll? – Kanning millum tey, sum hava tikið miðnámsprógv í Suðuroynni árini 1976-2006**<br>Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. |
| Arbeiðsrit 23, 2009: | **Hvar eru tey, og hvussu eru tey nøgd? – Kanning millum lesandi á Fróðskaparsetrinum árini 1999-2009**<br>Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. |
| Arbeiðsrit 22, 2009: | **Føroysk sjófólk, sum sigla í øðrum londum**<br>Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, og Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. |
| Arbeiðsrit 21, 2009: | **Motivatiónskanning 2008 - dáturit**<br>Jógvan Mørkøre, stjórnmálafrøðingur, Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. |
| Arbeiðsrit 20, 2009: | **Bygnaðarligu trupulleikarnir størsta avbjóðingin**<br>Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. |
| Arbeiðsrit 19, 2008: | **Tilgongd til kommunusamanlegging í Suðuroy**<br>Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, og Jógvan Mørkøre, stjórnmálafrøðingur, Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. |
| Arbeiðsrit 18, 2008: | **Nærverkið – ein góð tænasta**<br>Olga Biskopstø, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. |
| Arbeiðsrit 17, 2007: | **Happing í føroyska fólkaskúlanum - ein spurnakanning**<br>Karin Jóhanna L. Knudsen, samfelagsfrøðingur, Martha H. Mýri, samfelagsfrøðingur, & Jógvan Mørkøre, stjórnmálafrøðingur, Granskingardepilin fyri Økismenning. |
| Arbeiðsrit 16, 2007: | **Livikorini hjá fyritíðarpensjónistum í Føroyum - ein spurnakanning**<br>Olga Biskopstø & Martha Mýri, samfelagsfrøðingar, Granskingardepilin fyri Økismenning. |
| Arbeiðsrit 15, 2007: | **Demografisk lýsing av Suðuroy 2007**<br>Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Økismenning. |
| Arbeiðsrit 14, 2007: | **Vinnulívið í Suðuroynni í 2006**<br>Dennis Holm, samfelagsfrøðingur og Bogi Mortensen, Siviløkonom, Granskingardepilin fyri Økismenning. |

Arbeiðsrit 13, 2007: **Fólk og vinna í Sandoyar Sýslu 2006**
Dennis Holm, samfelagsfrøðingur og Bogi Mortensen, Siviløkonom, Granskingardepilin fyri Økismenning.

Arbeiðsrit 12, 2006: **Sjúkrarøktafrøðingur í 2006 - ein trivnaðarkanning**
Karin Jóhanna L. Knudsen og Martha H. Mýri, samfelagsfrøðingar, Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 11, 2006: **Arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini**
Dennis Holm, samfelagsfrøðingur og Bogi Mortensen, Siviløkonom, Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 10, 2006: **Hækkandi oljuprísir, djúpvatnstrolarar og møguligar avleiðingar fyri Suðuroynna**
Bogi Mortensen, Siviløkonom og Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 9, 2004: **Ung, útbúgving og fiskivinna**
Olga Biskupstø og Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingar, Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 8, 2004: **Fjarferðing í Føroyum**
Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 7, 2004: **Kommunusamanlegging - hvat siga suðringar?**
Dennis Holm og Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingar, Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 6, 2003: **Kanning av viðurskiftunum hjá apopleksiraktum í Føroyum**
Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 5, 2003: **Ynski og tørvur á eldraøkinum í Vágum**
Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 4, 2003: **Rekrutering av høgt útbúnari arbeiðsmegi til fiskivinnuna**
Gestur Hovgaard, samfelagsfrøðingur Ph.D., og Haldbera West, Stud. Scient. Pol. Granskingardepilin fyri Økismenning.

Arbeiðsrit 3, 2002: **Tørvur á kollegium í Klaksvík - Hvat halda tey ungu?**
Olga Biskupstø, Dennis Holm, samfelagsfrøðingar, og Gestur Hovgaard, samfelagsfrøðingur Ph.D., Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 2, 2002: **Lærari í Føroyum 2002 - limakanning hjá Føroya Lærarafelag**
Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 1, 2002: **Kommunalt samstarv - ein onnur loysn enn kommunusamanlegging ?**
Dennis Holm og Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingar, Granskingardepilin fyri Økismenning

Arbeiðsrit 1, 2001: **Økismenning á beina kós**
Gestur Hovgaard, samfelagsfrøðingur, Ph.D., Granskingardepilin fyri Økismenning

**Smárit**

Smárit 10, 2004: **Rekruttering af højtuddannede til fiskerierhvervet**
Internordisk konference på Hotel Hafnia i Tórshavn (Færøerne) 3. – 5. des. 2003. Susanne Madsen (red).

Smárit 9, 2003: **The role of the Highlands and Islands Enterprise in Community Development**
Stuart Black, Director, Strengthening Communities Group, Highlands and Islands Enterprise.

| | |
|---|---|
| Smárit 8, 2002: | **There are More Vets than Doctors in Chiloé**<br>Gene Barrett, Ph.D. Professor of Sociology, Saint Mary's University, Halifax, N.S. B3H 3C3. |
| Smárit 7, 2001: | **Social Capital, Community, and the Dialectics of Globalization**<br>Gene Barrett, Ph.D. Professor of Sociology, Saint Mary's University, Halifax, N.S. B3H 3C3. |
| Smárit 6, 2000: | **Eiði 1960-2000 og komandi**<br>**Fundur í Eiðis skúla 3. apríl 2001 fyriskipaður av Eiðis kommunu og Granskingarverkætlanin fyri Økismenning.**<br>Pallborð: Carl-Gustav Thornström, Svøríki, og Ottar Brox, Noreg. |
| Smárit 5, 2000: | **Coping with a Changing Economy in the Northern Localities: An Icelandic Case Study**<br>Unnur Dís Skaptadóttir, Department of Anthropology, University of Iceland |
| Smárit 4, 2000: | **Safety Awareness in the Nova Scotia Deep-sea Fishery**<br>Professor, Marian Binkley, Faculty of Arts and Social Sciences, Dalhousie University, Halifax |
| Smárit 3, 2000: | **From Fishing Centre to Tourist Destination - The Restructuring of Lunenburg, Nova Scotia**<br>Professor, Marian Binkley, Faculty of Arts and Social Sciences, Dalhousie University, Halifax |
| Smárit 2, 2000: | **Samfunnsvitenskapelig forskning på marin ressousforvaltning**<br>Professor Svein Jentoft, Institutt for planlegging og lokalsamfunnsforskning, Universitetet i Tromsø |
| Smárit 1, 2000: | **Lokalsamfunnet i fiskeriforvaltningen**<br>Professor Svein Jentoft, Institutt for planlegging og lokalsamfunnsforskning, Universistetet i Tromsø |

**Námsrit**

| | |
|---|---|
| Námsrit 7, 2006: | **Bygdin - fyrr, nú og í framtíðini**<br>Bergmann Finnsson er Cand. Scient. Soc. í geografi og søgu, Sámal Matras Kristiansen er Cand. Scient. Soc. í samfelagsfrøði og geografi. |
| Námsrit 6, 2005: | **Ungdómur og mentanarlig globalisering**<br>Firouz Gaini, Cand. Scient. Anth. og Ph.D. lesandi á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetur Føroya. |
| Námsrit 5, 2005: | **Uppgerð av løgtingsvalinum - Dagførd útgáva 2005, grundað á løgtingsvalið 2004**<br>Dennis Holm og Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingar, Granskingardepilin fyri Økismenning |
| Námsrit 4, 2004: | **Sosialur kapitalur - við støði í Robert D. Putnam**<br>Martha H. Mýri, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Økismenning |
| Námsrit 3, 2003: | **Fullveldislandsstýrið 1998-2002**<br>Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, Granskingardepilin fyri Økismenning |
| Námsrit 2, 2003: | **Ung í Føroyum**<br>Firouz Gaini, Cand. Scient. Anth. og Ph.D. lesandi á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetur Føroya. |
| Námsrit 1, 2002: | **Uppgerð av løgtingsvalinum**<br>Dennis Holm og Bjarni Mortensen, samfelagsfrøðingar, Granskingardepilin fyri Økismenning |

**Aðrar útgávur**

| | |
|---|---|
| 2010 | Jógvan Mørkøre og Petur Zachariassen 2010: **Valskipan og valdømini – upprit til Formansskapin í Løgtinginum**; *ikki útgivið.* |
| 2009 | Karin Jóhanna L. Knudsen *í* Kirsti Niskanen och Anita Nyberg (red.), 2009: **Kön och makt i Norden Del I Landsrapporter**; Nordisk Ministerråd, København 2009: |
| 2009 | Jógvan Mørkøre og Magni Laksáfoss 2009: **Rák í heimi og Føroyar - upprit til Tórshavnar Kommunu**; *ikki útgivið.* |
| 2009 | Holm, Dennis 2009: **Eldrabýlingar!**. Kronikkur í Dimmalætting 5. august 2009. |
| 2009 | Dennis Holm og Jógvan Mørkøre 2009: **Eftirmeting av dagstovnaøkinum - upprit til Kommunalu Umskipanarnevndina**; *partur av útgávuni hjá Kommunalu Umskipanarnevndini.* |
| 2009 | Dennis Holm og Jógvan Mørkøre 2009: **Eftirmetingarleistur - upprit til Kommunalu Umskipanarnevndina**; *partur av útgávuni hjá Kommunalu Umskipanarnevndini.* |
| 2009 | Jógvan Mørkøre 2009: **Motivatiónskanning 2008 - greining**; útgivið av Vinnuhúsinum 2009. |
| 2008 | Ingi Runar Edvardsson, Diana Tingley, Johann Asmundsson, Alexis J. Conides, Dennis Holm. 2008: **Fisheries management systems and risk perception among fishermen in Iceland, Faroe Islands, Greece and UK**; Paper presented at the ICES Annual Science Conference in Halifax, Nova Scotia, Canada, September 2008. |
| 2008 | Diana Tingley, Jóhann Ásmundsson, Edward Borodzicz, Alexis Conides, Ben Drakeford, Ingi Rúnar Eðvarðsson, Dennis Holm, Kostas Kapris, Bogi Mortensen. 2008: **Risk identification and perception in the fisheries sector: Comparisons between the Faroes, Greecem Iceland and UK**; Paper presented at the IIFET 2008 Vietnam Proceedings, Nha Trang, Vietnam, July 2008. |
| 2007 | Holm, Dennis 2007: **A Bottom-up Solution to Municipal Amalgamation in the Faroes**. Føroyskt Lógarrit. Vol. 6. No. 3. Mai 2007. |
| 2006 | Holm, Dennis 2006: **Kjakið um kommunusamanlegging manglar innihald**. Kronikkur í Dimmalætting 12. des. 2006. |
| 2006 | John Phynea, Gestur Hovgaard and Gard Hansen 2006: **Norwegian salmon goes to market: The case of the Austevoll seafood cluster**, *in JOURNAL OF RURAL STUDIES* |
| 2005 | Mortensen, Bjarni and Susanne Madsen, 2005: **Frágreiðing um matarvanar hjá fólkaskúlanæmingum**. Tórshavn: Fyribyrgingarráðið |
| 2004 | Mýri, Martha H. and Olga Biskopstø, 2004: **Institutions and Innovations - The case of three municipalities in the Faroe Islands** in Aarsæther (ed.) 2004: *Innovations in the Nordic Periphery*. Stockholm: NordRegio Report 2004:3 |
| 2004 | Holm, Dennis and Bjarni Mortensen 2004: **Regional Development in the Faroes: What is the Right Size for Effective Local Government?** in Byron, Hansen and Jenkins (ed.) 2004: *Regional Development on the North Atlantic Margin*. Aldershot (UK): Ashgate Publishing Limited. |
| 2004 | Hovgaard, Gestur, Grétar Thór Eythórsson and Katarina Fellman, 2004: **Future Challenges to Small Municipalities - The Cases of** |

| | |
|---|---|
| | **Iceland, Faroe Islands and Åland Islands**, *Nordregio 2004.* |
| 2003 | Andersen, John and Gestur Hovgaard, 2003: **Welfare and Urban planning in transition**, Workingpaper 8/2003, Roskilde Universitets Center (Samfundsvidenskab og Erhvervsøkonomi) |
| 2002 | Hovgaard, Gestur, 2002: **Coping Strategies and Regional Policies - Social Capital in the Nordic Peripheries - Country report Faroe Islands**. Workingpaper 2002:8, Nordregio |